

MC-Hár endaði konsertina við einum alt ov stuttum men sterkum braki



MC-Hár konsertin endaði við at Tróndur Herason, Hans Petur í Brekkunum og Dávur Magnussen komu á pallin og jammaðu við

sum kroyst saman og latið av í einum alt ov stuttum og rótutum – men kortini sterkum – braki.

**Swingandi tjald til tey vaksnu**

Undir allari konsertini bar eisini til – hjá teimum yvir 18 ár (sum ikki vóru so fá hesa ferð) – at fara í tjaldið niðri í garðinum at lurta eftir jazz og swing tónleiki, meðan tostin varð sløktur við eini bjór. Óført at ólavsøkukonsertin hevur fingið skeinkiloyvi. Eg skilti eisini, at prísirnir fyri bjórið vóru rímiligari her enn á G! Tónlistarliga var tað ein minst líka stór uppliving at hoyra ávikavist Brekku Brothers og brassbandið Stórbandittarnir undir leiðslu av Ólavi Olsen niðri í tjaldinum, sum tað var at standa uppi í garðinum. Spell, at tey yngri enn 18 ár ikki fingu hetta tilboð, tí tey hava uttan iva goldið tað sama sum eg fyri síni atgongumerki.

Samanumtikið var ólavsøkukonsertin 2006 góð. Hugskotið við at hava eitt minni stað, har til bera at hoyra annan tónleik enn popp, er gott. Tað kann eisini gera, at fleiri blásarar verða hugaðir at spæla við í popp og rokk bólkum, eisini á stóra pallinum, um teir í skiftum eisini sleppa at spæla fyri áhoyrarum, sum vilja hoyra annað enn popp og rokk. Lurtaraskarin til jazz og swing tónleik er ikki stórur í Føroyum, og tí hava fyriskipararnir rós uppiborið fyri hetta tiltak.

**Endurnýggjað ólavsøkukonsert**

Sum gamal ólavsøkukonsertgangari og – spælari er tað áhugavert at samanbera hesa seinastu konsertina við tær, ið vóru í fyrstani. Eg minnist best tær allar fyrstu, tær úti á Skansanum, tær (vátu) úti á Frælsinum og tær, sum vóru yviri við Strond, áðrenn hon loksins endaði í kommunuskúlagarðinum. Hvat er so hent hesi 20 árini? Føroyskur tónleikur hevur ment seg, ongin ivi er um tað. Og áhoyrararnir eru vorðnir kræsnari, krevja meira enn tá. Tónleikafestivalarnir eru ivaleyst komnir fyri at vera, og tað kann væl gera, at fólk mettast av øllum tónleikinum. Spurningurin er, um ólavsøkukonsertin hevur megnað at fylgt við og endurnýggjað seg?

Svarið er helst: bæði-og. Konsertin í ár ber boð um, at fyriskipararnir eru í holt við at finna ólavsøkukonsertini eitt nýtt pláss á føroyska tónleikapallinum. Tað er djarvt, gott og neyðugt. At satsa upp á tey meiri tilkomnu og kræsnu, at bjóða annað og meira enn bara popp og rokk, og kortini halda alt fyri ein sámiligan prís, tað er alla æru vert. Eg haldi, at hetta er ein fínur leistur, sum eigur at fáa nakrar kjansir afturat næstu árini, so fólk í hesum málbólki venja seg við tað og finna útav, at her er veruliga nakað at fara eftir hjá teimum eisini. Tí tað er tað.

Eftir at ólavsøkukonsertin í mong ár bert hevur vent sær til tannáringar, lokkar hon nú eisini aðrar aldursbólkar til, og tað haldi eg vera gott. Fyriskipararnir mugu tó ansa eftir, at tey yngru ikki verða heilt slept upp á fjall, tí manga ólavsøku hava tey ikki havt nakað annað gott at fara til enn ólavsøkukonsertina.